Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR

# Harrod's – vilt luksus fyri stóra pengapungin

**Mohammed Al-Fayed eigur stóru handilsfyritøkuna Harrod's. Hann er vorðin kendur fyri ótroyttiligu royndirnar at prógva, at sonur hansara, Dodi Al-Fayed, og heimskenda prinsessa Diana, ikki doyðu av tilvild, men vóru myrd við beráddum huga undir tunlinum í franska høvuðsstaðnum 31. august 1997.**






Harrod's er ein handil langt út um tað vanliga. Handilin hevur 330 ymsar deildir og selur alt frá stoppinálum til livandi grindahval.

Inni har finnur tú klæðir til øll endamál, heilt frá smábørnum til oldingar, til kvinnu eins væl og til mann. Tú finnur eltól, gimsteinar, ítróttaklæðir, brúðarkjólar, kelidjór, leikur, mat og drekka, heilsu- og vakurleikaúrdráttir, innbúgv – ja, stutt sagt alt, sum tú hevur brúk fyri.

Handilin er heldur ikki av teimum bíligastu í London. Vit rendur okkum til dømis inn í ein penn, sum kostaði 20.000 krónur!

Í handlinum finnur tú 28 ymsar matstovur, sum borðreiða við øllum frá té til tapas til pubb-mat til fínastu rættir tú kanst hugsa tær.

Handilin hevur eitt samlað øki upp á 23.000 fermetrar, og tað ger hann til størsta handilin í verðini, á støðd við Macy's í New York.

Men Muhammed Al-Fayed ræður yvir einum størri imperium enn sum so. Tað telur millum annað Harrod's Bank, Harrod's Estates, Harrod's Casino, Harrod's Aviation og Air Harrod's.

Tað byrjaði annars í smáum, tá Charles Henry Harrod byrjaði ein handil í Stepney, serliga við útsølu av té. Hetta var í 1834. Í 1849 tók Harrod yvir ein handil í Knightsbridge, tí hann vildi verða við til stóru Great Exhibition í 1851 í Hyde Park. Og her heldur Harrod's til dagin í dag.

Sonurin, Charles Digby Harrod, útbygdi handilin, og longu í 1880 hevði Harrod's eitthundrað starvsfólk.

Handilin fekk kortini eitt álvarsamt bakkast í desember 1883, tá handilin brendi í grund. Ófatiliga helt Charles Harrod øll síni lyfti til kundar sínar og bar út alt tað, sum hesir høvdu bílagt upp til jóla.

Í 1985 keypa Al-Fayed brøðurnir Harrod's fyri 61,5 milliardir krónur, og teir eiga handilshúsið Harrod's enn tann dag í dag.

**Puntur nr. 10**





## Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bilasøluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

sansir.fo